tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tværoyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3/2018 |
| Fundardagur | 5. marts 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

Møtt: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Kristina Roest, Alvi Mortensen, Annika Pearce (tiltakslimur fyri Bjarna Hammer), Bogi Johannesen og Súsanna Bertholdsen

Skrivari: Henrik Weihe Joensen

## Yvirlit yvir mál til viðgerðar


| Pkt. | Tekstur | Síða |
|---|---|---|
| 1 | Góðkenning smb. kommunustýrislógini í.s.v. innkallan av tiltakslimi | 2 |
| 2 | Skattatøl februar 2018 | 2 |
| 3 | Uppskot at broyta byggisamtykt í Froðba fyri økið til nýggjan kirkjugarð | 3 |
| 4 | Næsta stig viðvíkjandi Roykstovuni/Faktorhúsinum, | 4 |
| 4 | Val av umboðum í borgara- og vinnulívsbólk í.s.v. virðis- og visjónstilgongdina | 6 |
| 5 | Uppskot frá útleigara um leigusáttmála viðvíkjandi kommunulækna-avloysarum | 7 |
| 6 | Góðkenning av samstarvsavtalu við Gjaldstovuna um starvsfólkalønarportal | 8 |
| 7 | Uppskot um dagføring av tilbúgvingar-samstarvi við Hvalbiar- og Fámjins kommunu | 9 |
| 8 | Uppskot um, at yvirskipað tilbúgvingarætlan fyri Tvøroyri eisini fevnir um aðrar kommunur | 9 |
| 9 | Uppskot um bygging av nýggjari tilbúgvingarstøð | 10 |
| 10 | Tvøroyrar kommuna í samstarv um ABC verkætlan um sálarliga heilsu | 12 |

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3/2018 |
| Fundardagur | 5. marts 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**00.22.02-G00-1-18**

## 1. Góðkenning smb. kommunustýrislógini í.s.v. innkallan av tiltakslimi

### Málsfrágreiðing

Býráðið skal sambært § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini taka støðu til um treytirnar fyri innkallan av tiltaksliminum Anniku Pearce fyri Bjarna Hammer, býráðslim, sum hevur givið avboð til fundin, eru loknar.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt treytirnar fyri, at Annika Pearce sum tiltakslimur tekur sæti í Tvøroyrar býráð fyri Bjarna Hammer, býráðslim, í sambandi við fundin í dag.

### Skjøl

- Móttøkuváttan frá Anniku Pearce
- Innbjóðing til býráðsfund, send til Anniku Pearce
- Móttøkuváttan frá kommunustjóranum til Bjarna Hammer

**25.20.00-I00-1-18**

## 2. Skattatøl februar 2018

### Málsfrágreiðing

Borgarstjórin kunnar um skattatølini fyri februar 2018.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3/2018 |
| Fundardagur | 5. marts 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

### Avgerð

Býráðið tók kunningina frá borgarstjóranum til eftirtektar.

### Skjøl

- Samanbering av skatti 2017-2018.xlsx

**04.31.10-G01-1-17**

## 3. Uppskot at broyta byggisamtykt í Froðba fyri økið til nýggjan kirkjugarð

### Málsfrágreiðing

Lasse Jensen, tekniskur málsviðgeri, gjørdi kommunustjóran varugan við, at býráðið á fundinum tann 31. januar 2018 bert samtykti ein part av tí tilmæli, sum tekniska nevnd var komin við í sambandi við at broyta byggisamtyktina fyri Froðba. Býráðið verður tí á hesum fundi biðið um at taka støðu til hetta tilmæli frá teknisku nevnd:

"Nevndin mælir til, at broyta matr.nr. 23c í Froðba frá øki B1 (Bústaðarøki) til øki E, ið skiftir navn frá "Almennar stovnar" til "Alment endamál".

Samstundis verða ásetingarnir fyri øki E broyttar til eisini at umfata kirkjugarðar.

Matr. nr. 23m í Froðba verður broytt frá øki B1 (bústaðarøki) til C (Vinnuøki)."

**Tekniska nevnd, 29. januar 2018, pkt. 2:**
Nevndin mælir til, at broyta matr.nr. 23c í Froðba frá øki B1 (Bústaðarøki) til øki E, ið skiftir navn frá "Almennar stovnar" til "Alment endamál".

Samstundis verða ásetingarnir fyri øki E broytar til eisini at umfata kirkjugarðar.

Matr. nr. 23m í Froðba verður broytt frá øki B1 (bústaðarøki) til C (Vinnuøki).

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 3/2018 |
|---|---|
| Fundardagur | 5. marts 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Býráðið, 31. januar 2018, pkt. 4:**
Býráðið samtykti einmælt, at broyta byggisamtyktina fyri Froðba - í sambandi við ger av kirkjugarði - sambært tilmæli frá teknisku nevnd, at broyta matr.nr. 23c í Froðba frá øki B1 (Bústaðarøki) til øki E, ið skiftir navn frá "Almennar stovnar" til "Alment endamál".

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá teknisku nevnd og broyta byggisamtyktina soljóðandi:

"Matr.nr. 23c í Froðba frá øki B1 (Bústaðarøki) til øki E, ið skiftir navn frá "Almennar stovnar" til "Alment endamál".

Samstundis verða ásetingarnir fyri øki E broytar til eisini at umfata kirkjugarðar.

Matr. nr. 23m í Froðba verður broytt frá øki B1 (bústaðarøki) til C (Vinnuøki).

### Skjøl

- Matr nr. 23c Froðba
- 29.10.2018 Nýggjur Kirkjugarður Støðumynd2.pdf
- 24.10.2017 Nýggjur Kirkjugarður Støðumynd1.pdf
- Samskifti við Lasse Jensen viðv. málinum

**00.01.10-I00-20-17**

## 4. Næsta stig viðvíkjandi Roykstovuni/Faktorhúsinum,

### Málsfrágreiðing

Býráðið gav umsitingini heimild til at bjóða upp til kr. 600.000,- fyri Roykstovuna/Faktorhúsini, og nú hevur Fríða Patursson, advokatur, vegna Onnu Kirstin Thomsen, tikið av hesari upphædd



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 3/2018 |
|---|---|
| Fundardagur | 5. marts 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

soleiðis at Tvøroyrar kommuna mánadagin tann 19. februar 2018 keypti Roykstovuna/Faktorhúsini fyri kr. 600.000,- Tvøroyrar kommuna kemur at gjalda ein fyrisitingarligan kostnað av keypinum á kr. 17.000,- sum er gjald fyri tinglýsing og uppsetan av skeytið í sambandi við yvirtøku av ognini.

Nú er spurningurin, hvat ognin, ið er elsta hús á Tvøroyri, skal brúkast til. Tað er henda spurning, sum býráðið skal royna at svara á fiundinum í dag við støði í tilmælinum frá mentanarnevndini.tann 26. februar og fíggjarnevndini tann 28. februar 2018.

**Býráðið, 5. februar 2018, pkt. 1:**
Býráðið tók støðu til tvey tilmæli:

1. Tilmæli frá meirlutanum í fíggjarnevndini um at bjóða upp til kr. 600.000,- uppá ognina.

2. Tilmæli frá Anitu Vibergsdóttir um at bjóða kr. 700.000,- uppá ognina.

Býráðið atkvøddi um tilmæli 2 fyrst: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir og Alvi Mortensen atkvøddi fyri. Eingin atkvøddi ímóti. Tilmæli nr. 2 er fallið.

Býráðið atkvøddi um tilmæli 1: Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen og Annika Pearce atkvøddu fyri tilmælinum. Eingin atkvøddi ímóti. Tilmælið nr. 1 er samtykt.

Býráðið gav við hesari samtykt umsitingini hjá Tvøroyrar kommunu heimild til at bjóða upp til kr. 600.000,- uppá ognina.

**Mentanarnevndin, 26. februar 2018, pkt. 10:**
Mentanarnevndin umrøddi hvat Faktorhúsini kundu verið nýtt til, ymisk uppskot blivu nevnd, men fyrst má Tekniska Deild meta hvørjar ábøtur er bráfeingis og gera eina aktuella støðulýsing. Støða verður tikin til hvat húsini skulu nýtast til hareftir.

**Fíggjarnevndin, 28. februar 2018, pkt. 3:**
Samtykt varð ikki at tekna ognarskiftistrygging.
Kristin setti fram uppskot um tilmæli til býráðið at gera eina hugskotskapping um hvat húsini kunnu verða nýtt til. Freistin kundi verið sett til 1. juni 2018.

**Avgerð**
Býráðið tók undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini um ikki at stovna eina ognarskiftistrygging.

Býráðið samtykti, at fylgja tilmælinum frá borgarstjóranum, at gera eina hugskotskapping um hvat húsini kunnu verða nýtt til. Freistin verður sett til 1. juni 2018. Umsitingin fyrireikar kunningina um



Formansváttan

hugskotskappingina við fakta-tilfarið. Býráðið ynskir, at geva virðisløn fyri 3 tey bestu hugskotini á kr. 6.000,- 4.000,- og 2.000,- Bestu hugskotini verða avdúkaði á mentanarnáttini á Tvøroyri fyrst í juli mánaða 2018.

**Skjøl**

- Bræv við boðið uppá Roykstovuna, matr.nr. 440a Froðba
- Samskifti við Fríðu Patursson, advokat
- Tilmæli til býráðið viðv. Thomsens hús
- Móttøkuváttan frá Fríðu Patursson
- Bræv við svarið, sent til Fríðu Patursson, advokat
- Bræv við svarið til Fríðu Patursson, advokat
- Matr.nr. 440a Froðba, búgvið Th. F. Thomsen

**00.01.00-A00-14-16**

## 4. Val av umboðum í borgara- og vinnulívsbólk í.s.v. virðis- og visjónstilgongdina

### Málsfrágreiðing

Við støði í samtykt býráðsins tann 29. desember 2017, hava allir nevndir hjá Tvøroyrar býráð her í februar mánaða havt høvi til at tilnevna uppskot til persónar í ein borgara- og vinnulívsbólk, sum skal geva Tvøroyrar býráð ráð og íblástur til víðari-menning av Tvøroyri í sambandi við virðis- og visjónstilgongdina, sí viðfestu skjøl í málinum, har uppskot til persónar í henda bólk eru nevndir.

Allar nevndir eru á einum máli um, at bíða við at seta henda borgara- og vinnulívsbólk á stovn fyri ístaðin at gera núverandi virðis- og visjónsarbeiði fyri Tvøroyrar kommunu liðugt.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3/2018 |
| Fundardagur | 5. marts 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá nevndunum og leggja borgara- og vinnulívsbólkin til síðis fyribils.

### Skjøl

- Dagsordenspunkt: Tilnevning av limum í borgara- og vinnulívsbólk í.s.v. virðis- og visjónstilgongdina behandlet på mødet 29. december 2017 kl. 12:00 (Býráðsskrivstovan) i Býráðið (2017).docx
- Uppskot til limir í borgara- og vinnulívsbólkin

**82.03.00-Ø54-1-18**

## 5. Uppskot frá útleigara um leigusáttmála viðvíkjandi kommunulækna-avloysarum

### Málsfrágreiðing

Tróndur Hammerfoss Olsen avhendar umsitingini uppskot til leigusáttmála viðvíkjandi sethúsum hansara í Trongisvági (fyrrverandi sethús hjá Ronnie Midjord) við atliti til, at leiga sethúsini út til kommunulækna-avloysarar og har Tvøroyrar kommuna er leigari, sí viðfesta uppskot til leigusáttmála frá Tróndi Hammerfoss Olsen.

Fíggjarnevndin hevur gjørt tilmæli i málinum.

**Fíggjarnevndin, 28. februar 2018, pkt. 2:**
Eftir upplýsingum frá Pólu, er vaskimaskina og sjónvarp í leigumálinum.
Samtykt at taka undir við hesum leigusáttmála fyri árið 2018 áljóðandi kr. 6.000,00 incl. ljós og hita.

### Avgerð

Býráðið tók kunningina frá fíggjarnevndini til eftirtektar.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3/2018 |
| Fundardagur | 5. marts 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Skjøl**

- Leigusáttmáli Sóljugøta 4 Tróndur Hammerfoss Olsen

**81.10.00-A00-2-17**

## 6. Góðkenning av samstarvsavtalu við Gjaldstovuna um starvsfólkalønarportal

### Málsfrágreiðing

Gjaldstovan hevur ment eina nýggja starvsfólkalønarskipan, sum Tvøroyrar kommuna ynskir at verða ein partur av sum ein av fyrstu kommununum í Føroyum. Henda skipan vil gera umsitingina av lønar- og starvsfólkamálum meira gjøgnumskygda og úrslitagóða. Fundur við Gjaldstovuna í hesum sambandi varð hildin 28. juni 2017, men ikki fyrrenn nú er tað komið har til, at Gjaldstovan hevur gjørt eitt uppskot til eina samstarvsavtalu við Tvøroyrar kommunu, sí viðfestu skjøl.

Gjaldstovan upplýsir, at kostnaðurin fyri skipanina er ein eingangsupphædd á kr. 35.000,- sum verður goldin í ár og síðani ein árligur kostnaður á kr. 12.000,- galdandi frá 2019 at rokna. Fíggjarleiðarin og kommunustjórin mæla til, at góðkenna uppskot til samstarvsavtalu við teimum viðmerkingum, sum kommunustjórin nevnir og uppskot til fígging av skipanini.

### Avgerð

Býráðið tekur einmælt undir við at fara uppí starvsfólkalønarportalin saman við Gjaldstovuni, men ynskir at fáa útgreina møguligan meirkostnað av skipaninini. Umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Skjøl**

- Til fíggjardeildina - uppskot til samstarvsavtalu við Gjaldstovuna viðvíkjandi starvsfólka-lønarportali til viðmerkingar.
- Starvsfólkalønarportalur - avtala millum Gjaldstovuna og Tvøroyrar kommunu.docx
- Atgongd til Starvsólkaportalin
- Svar frá Duritu Tausen, stjóra, í.s.v. áheitan frá kommunustjóranum

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3/2018 |
| Fundardagur | 5. marts 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**14.00.00-A00-4-16**

## 7. Uppskot um dagføring av tilbúgvingar-samstarvi við Hvalbiar- og Fámjins kommunu

### Málsfrágreiðing

Tilbúgvingarnevndin, har borgarstjórin á Tvøroyri er formaður, saman við borgarstjórunum í Hvalbiar- og Fámjins kommunu umrøddu á fundi 2. mars 2018 dagføring av samstarvsavtaluni og møguligt framtíðar tilbúgvingar-samstarv við Fámjins kommunu.

**Tilbúgvingarnevndin (Brunanevndin), 2. marts 2018, pkt. 1:**
Tosað varð um endurskoðan av samstarvssáttmálanum millum Tvøroyrar og Hvalbiar Kommunur, og um møguliga at víðka samstarvið til Fámjins kommunu.
Tekniska deild kemur við kostnaðameting bæði fyri íløgur og rakstur, og hon verður send Hvalbiar og Fámjins kommunur til støðutakan.

### Avgerð

Býráðið tók kunningina til eftirtektar, og ynskir at arbeiða fram ímóti einari dagførdari samstarvsavtalu við Hvalbiar kommunu um tilbúgving. Møguliga verður Fámjins kommuna ein partur av hesari samstarvsavtalu. Hvalbiar kommuna og Fámjins kommuna venda aftur við einum svarið hesum viðvíkjandi aftaná medio apríl 2018.

**14.00.00-A00-4-16**

## 8. Uppskot um, at yvirskipað tilbúgvingarætlan fyri Tvøroyri eisini fevnir um aðrar kommunur

### Málsfrágreiðing

Yvirskipaða tilbúgvingarætlanin hjá Tvøroyrar kommunu bleiv umrødd á fundi í tilbúgvingarnevndini tann 2. mars 2018. Í hesum sambandi bleiv umrøtt, um tilbúgvingarætlanin eisini skal fevna um Hvalbiar- og Fámjins kommunur.

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| Fundur nummar | 3/2018 |
|---|---|
| Fundardagur | 5. marts 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Tilbúgvingarnevndin (Brunanevndin), 2. marts 2018, pkt. 2:**
Henrik Weihe Joensen kunnaði nevndina um arbeiðið hjá Tvøroyrar Kommunu við at orða eina tilbúgvingarætlan, og at gera eina váðameting.
Medio apríl kemur afturmelding úr bygdarráðunum í Hvalba og Fámjin, um tey ynskja at vera við í ætlanini.

### Avgerð

Býráðið tók kunningina til eftirtektar, og ynskir at arbeiða fram ímóti at skriva Hvalbiar kommunu og møguliga Fámjins kommuna inn í yvirskipaðu tilbúgvingarætlanina, sum Tvøroyrar kommuna hevur gjørt uppskot til. Hvalbiar kommuna og Fámjins kommuna venda aftur við einum svarið hesum viðvíkjandi aftaná medio apríl 2018.

### Skjøl

- Uppskot til yvirskipaða tilbúgvingarætlan
- Innbjóðing til borgarstjórar um fund viðv. tilbúgvingar-samstarv

**82.00.00-P20-1-13**

## 9. Uppskot um bygging av nýggjari tilbúgvingarstøð

### Málsfrágreiðing

Uppskot til nýggja tilbúgvingarstøð á Tvøroyri verður umrøtt.
- Í hesum sambandi verður fíggingarleisturin umrøddur bæði rakstur og íløga.

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3/2018 |
| Fundardagur | 5. marts 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Tilbúgvingarnevndin (Brunanevndin), 2. marts 2018, pkt. 3:**
Nevndin er kunnað um ætlanir hjá Tvøroyrar Kommunu um møguliga bygging av tilbúgvingarstøð (brandstøð).
Tekniska deild kemur við kostnaðarmeting í komandi viku, og hon verður send til Hvalbiar og Fámjins kommunur.
Medio apríl kemur afturmelding úr bygdarráðunum í Hvalba og Fámjin.

## Avgerð

Býráðið tók kunningina til eftirtektar, og ynskir at arbeiða fram ímóti, at gjørd verður ein tilbúgvingarstøð á Tvøroyri. Hvalbiar kommuna og Fámjins kommuna vera møguliga við til at fíggja tilbúgvingarstøðina. Tekniska deild sendir kostnaðarætlan og uppskot til staðseting av tilbúgvingarstøðini til Hvalbiar kommunu og Fámjins kommunu í hesum vikuni. Avtala er, at Hvalbiar- og Fámjins kommunur venda aftur við einum svarið hesum viðvíkjandi aftaná medio apríl 2018.

## Skjøl

- Dagsordenspunkt: Uppskot um bygging av tilbúgvingarstøð (Brandstøð) behandlet på mødet 31. januar 2018 kl. 17:00 (Býráðsskrivstovan) i Býráðið (2018).docx
- Dagsordenspunkt: Uppskot um bygging av tilbúgvingarstøð (Brandstøð) behandlet på mødet 29. januar 2018 kl. 13:15 (Býráðssalurin) i Tekniska nevnd (2018).docx
- tilbúgvingarstøðin 27-01-2018.pdf
- brandstøð.pdf



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3/2018 |
| Fundardagur | 5. marts 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**27.00.00-I00-1-18**

## 10. Tvøroyrar kommuna í samstarv um ABC verkætlan um sálarliga heilsu

### Málsfrágreiðing

Við verkætlanini ABC fyri sálarliga heilsu vil Fólkaheilsuráðið fremja eina góða sálarliga heilsu hjá føroyingum. Ein týdningarmikil liður í hesum arbeiði snýr seg um at skapa góðar karmar fyri sálarliga heilsufremjandi virksemi, og at skapa góðar møguleikar fyri at gerast partur av sosialum felagsskapi í nærumhvørvinum.

Nærri kunning um hetta samstarv sæst á leinkinum her frá heimasíðuni hjá Fólkaheilsuráðnum http://www.folkaheilsa.fo//abc+samstarvsfelagar.html

Sosiala nevnd hevur viðgjørt málið og beinir tað í býráðið til kunning.

**Sosiala nevnd, 27. februar 2018, pkt. 3:**
Nevndin er sera jalig yvirføri at Tvøroyrar kommuna skal gerast samstarvsfelagi hjá Folkaheilsuráðnum um ABC-verkætlan um sálarliga heilsu. Samstarvið er ókeypis at luttaka í, og mælt verður til, at Bjarni Nygaard, trivnaðarfólk, verður lyklapersónur hjá Tvøroyrar kommunu. Málið verður beint í býráðið til kunning.

### Avgerð

Býráðið samtykti einmælt, at fylgja tilmælinum frá sosialu nevnd og gerast samstarvsfelagi hjá Folkaheilsuráðnum um ABC-verkætlan um sálarliga heilsu. Samstarvið er ókeypis at luttaka í, og ynskti, at trivnaðarfólkið verður kontaktpersónur hjá Tvøroyrar kommunu til Fólkaheilsuráðið í hesum sambandi.

### Skjøl

- SV: ABC fyri sálarliga heilsu - móttøkuváttan
- ABC fyri sálarliga heilsu - umbøn um at fáa mál á skrá



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3/2018 |
| Fundardagur | 5. marts 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |



Formansváttan

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3/2018 |
| Fundardagur | 5. marts 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |

**Bók lisin Fundur lokin kl. 18:15**

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Kristina Roest

Alvi Mortensen

Annika Pearce

Bogi Johannesen

Súsanna Bertholdsen

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

| | |
|---|---|
| Fundur nummar | 3/2018 |
| Fundardagur | 5. marts 2018 kl. 17:00-18:15 |
| Fundarstaður | Býráðsskrivstovan |



Formansváttan